**Umhvørvisátakið 2010**

Á almennari samkomu hósdagin 24.juni vóru vinnarar av Umhvørvisátakið 2010 avdúkaðir. Væl av fólki var møtt til hátíðarløtuna í Perluni umboðandi kommunur, ferðavinnu og náttúruvernd, og fyrireikarar, sponsorar og umboð frá almennu stovnunum, ið fyriskipa tiltakið.

Jákup Pauli Joensen, stjóri fyri Umhvørvisstovuna, beyð vælkomin, og lýsti hann í røðu síni søguligu gongdina, hvussu tiltakið hevði flutt seg við ymiskum kappingargeinum og annars hvussu stóran týdning tiltakið hevði, at ljós varð sett á náttúru- og umhvørvismál í kommununum, og at siðsøga og umstøður til felags tiltøk og ferðavinnu eisini vóru havd frammalaga í átakinum.

**Best røkta bygd**

Best røkta bygd er afturvendandi kappingargrein, og hevði 4 kommunur melda 5 bygdir til kappingina. Annika Olsen, landsstýriskvinna, avdúkaði her vinnarar og handaði virðislønir. Fyrsta virðislønin fór til Fámjin og hevði metingarnevndin hesar grundgevingar:

Fyrsta virðislønin fyri Best røktu bygd verður latin einari bygd, ið eisini fyrr hevur víst seg frammarliga í kappingini. Bygdin er framúr væl fyriskipað í búseting og bygging annars, og vegakervið er gott og væl virkandi. Bygdin hevur raðfest spillivatnsskipanina og er komin rættiliga langt áleiðis at hava eina fullførda og lidna skipan. So at siga einki órudd sæst, og væl verður gingið um, at øki fram við vegjaðara, við byggigrundir, girðingar og annað er væl frágingið.
Borgarin hevur sera góðar umstøður at luttaka í felags tiltøkum, ferðafólkatænastan er ment nógv, og dentur er lagdur á at halda søgulig støð og fornminni í góðum standi.
Afturat hesum hevur kommunan og bygdaráðið víst framskygni í burðardyggari menning og nýhugsanum við at leggja økið út til viðalund og snildisliga seta upp nýggjan drekkivatnsbrunn inn í eldri grótbrot og leggja flag á.



Onnur virðislønin varð latin til Tjørnuvík við hesum grundgevingum:

Onnur virðislønin fyri Best røktu bygd verður latin einari bygd, ið áður hevur víst seg at liggja frammarlaga í kappingini. Bygdin er væl fyriskipað í búseting og bygging annars, nógv er gjørt við at varðveita fornar bygningar, og vegakervið og bilstøðapláss eru góð og væl virkandi. So at siga einki órudd sæst, og væl er gingið um soleiðis, at bygdin er nosslig og vøkur at koma til.
Borgarin hevur góðar umstøður at luttaka í felags tiltøkum, ferðafólkatænastan er ment, líkasum gomlu húsini og bygdaumhvørvið er eitt satt prýði í føroyskum byggisiði.




**Best røkta bygdagøta**
Nýggjar kappingargreinar vóru til Umhvørvisátakið í ár. Besta røkta bygdagøta skuldi finnast, Ársins grøni stovnur, og so Besta átak, har metingarnevndin sjálv hevur møguleika at skjóta upp ein vinnara.



Í kappingini Best røkta bygdagøta høvdu tvær kommunur melda til kapping. Jon Hestoy, stjóri á FøroyaPrent, ið stóð sum sponsorur við vinningum og eisini hevði gjørt framúr snøgg heiðursbrøv til allar vinnarar, avdúkaði vinnarar til Best røktu bygdagøtu og Ársins grøna stovn.

Í grundgevingini hjá metingarnevndini verður sagt um vinnaran av Best røktu bygdagøtu, gøtan Lerivík-Gøta:

Virðislønin fyri Best røktu bygda- og varðagøtu verður latin til øki, har bygdagøtan hevur havt stóran týdning gjøgnum tíðirnar, men sum eisini enn verður nógv brúkt, og kanska hjá nøkrum er vorðin fastur táttur at ganga á hvørjum ári. Gøtan er væl hildin og trygg um skarið. Gøtan er lætt at finna á báðum síðum fjallinum og væl er frámerkt, hvar hon byrjar og hvar leiðin gongur eftir varðunum.

**Ársins grøni stovnur**

Kappingin um Ársins grøna stovn stóð millum tríggjar kommunur har tveir dag-stovnar og ein skúli kappaðust. Vinnarin varð Vestmanna Skúli, og hevði metingar-nevndin hesar grundgevingar:

Virðislønin fyri Ársins grøna stovn verður latin til stovn, har metingarnevndin er púra samd, at her er stovnur, ið er komin heilt langt áleiðis og hevur rokkið fleiri málum at minka um orkunýtslu til bæði upphiting og ravmagn, ið hevur fingið í lag vælvirkandi ruskskiljing har pappír, matleivdir, battaríir og annað rusk alt verður tikin inn til hagreiðing. Nakað fer til beinleiðis endurnýtslu, annað er vandamikið rusk, meðan matleivdir fara til kompost, har tøðini verða nýtt í viðarlundini og aðrari gróðurseting, ið skapt er kring stovnin farnu 10 árini.
Skráir og ætlanir eru lagdar har myndugleikar, starvsfólk og brúkarar í felag skipa grønu verkætlanina, ið støðugt er í menning og útbygging. Við framskygni og við áhaldandi at menna grøn tiltøk, er hesin stovnur fyrimyndarligur og eitt gott dømi um, hvussu slíkir stovnar kunnu skipast.



**Besta átak**
Til kappingina um Besta átak, hevði tríggjar kommunur melda seg til. Her metti metingarnevndin seg ikki kunna stuðla nakað av uppskotum, og skjeyt tí sjálv upp at geva virðislønina til sjálvsognarstovnin Dugni við teim báum verkstøðunum Endurnýtsluhøllin á Kambsdali og Tinghúsið inni á Hjalla.

Elin Lindenskov, býráðslimur og formaður í Heilsu- og Umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu, avdúkaði vinnaran við hesum grundgevingum frá metingar-nevndini:

Metingarnevndin hevur gjørt av at innstilla ein sjálvsognarstovn fyri bæði at hugsa um at nýta minni og serstakt um at bøta um og seta í stand brúktar lutir, ið kunnu seljast aftur fyri lítla upphædd og endurnýtast. Endurnýtslufyribrigdið er ikki ókent, men meta vit tó at stovnurin, eisini við sínum starvsfólkapolitikki, hevur rós uppiborið og at verða kosin Besta átak 2010.




Við hesum vóru allir vinnarar avdúkaðir og tók Kári Thomsen frá Agenda 21 Stovuni hjá Føroya Kommunufelag samanum, ynskti vinnarunum tilluku, og greiddi í stuttum frá hvussu átakið varð skipa í ár og at fyriskiparar og metingarnevnd, har Føroya Náttúruverndarfelag eisini er umboðað, vildu gera sítt til, at vit fáa eitt enn meira áhugavert og uppbyggjandi umhvørvisátak í 2012.

Vegna Umhvørvisátakið 2010

Agenda 21 Stovan, VisitFaroeIslands, Umhvørvisstovan og Føroya Náttúruverndarfelag